

*M'as Blues Band vælnøgd eftir eina framúr væleydnaða konsert í Christianskirkjuni hósdagin. Frá vinstru: Jóanes, Olfert, Emma, Demmis, Lennart, Eyðstein og Árni. Hósdagin kom onnur fløgan hjá teimum í røðini, "Hetta er eisini mítt land"*




*Pallvand, sum Emma er, fekk hon áhoyrarnar bæði at flenna og syngja við*



*Eyðstein mitt í verðini, væl fagnaður av ovfarakátum áhoyrarum*

# M'as í Christians-kirkjuni

**Hósdagin høvdu M'as Blues Band konsert í Christinanskirkjuni í Klaksvík. Tað vóru skúlarnir í Norðoyggjum, ið høvdu fingið innbjóðing til konsertina, sum var í samband við, at onnur fløgan í røðini, "Hetta er eisini mítt land", kom út**

KONSERT

*Myndir: Bárður Lydersen*
*Orð: Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

M'as Blues Band setti veruliga lív í bæði næmingar og lærarar í Christianskirkjuni hósdagin.

Tað vóru 1.- 7. flokkarnir í Norðoyggjum, sum vóru komin at lurta eftir Emmu og teimum, ið væl uppløgd sum altíð fingu øll at syngja við av hjarta.

Í samband við eina verkætlan, ferðast bólkurin runt landið at halda konsert fyri fólkaskúlanæmingum.

Eisini hava tey givið út enn eina fløgu, sum kom í handlarnar hósdagin.

Jóanes Jakobsen sigur, at hetta er ein liður í at skapa forstáilsi fyri teimum menningartarnaðu.

Konsertin hósdagin var sera væl eydnað, og hetta var fyrtsu ferð, at tey hava sungið fyri so nógvum áhoyrarum á eini innadura framførslu.

Á fløguni, "Hetta er eisini mítt land II", sum hevur 12 løg, fara ivaleyst fleiri at gerast landaplágur.



*Meðan Emma syngur og Árni spælir guitar, spælir Eyðstein hund*



*Um 500 næmingar úr 1.-7. flokkunum í Norðoyggjum vóru komin at lurta eftir Emmu og teimum*



*Tað eydnaðist Emmu og teimum fáa bæði børn og vaksin at syngja við av hjarta*

Vikuskifti

Nr. 228 • leygardagur • 29. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Óttin skapar vreiðina

Óttin fyri tí ókenda ger, at fólk ganga og eru vreið inn á øll, sum bara síggja út sum ein, sum kann finna upp á at spreingja eina bumbu. Við slíkum hugburði verður langt til semju og frið, heldur Carmi Gillon, fyrrverandi ísraelskur fregnarovasti og sendiharri í Danmark

**Lesið síðu 4**



# Innreið í Jerusalem

Tað vekir ongan stórvegis ans, at tveir vesturlendingar í fylgi við einum ísraelitta í dag fara um Kedrondalin niðan móti Jerusalems portrum. Men onkuntíð hevur innreiðin í Jerusalem verið øðrvísi

HUGLEIÐING

*Edvard Joensen*

**Jerusalem:** Tað skyggir í gyltum kuplum báðu megin Kedrondalin. Innanvert múrarnar er tað stóri Klettahalgidómur muslimanna, sum sýnir sítt skínandi hválv vítt um vegir. Og her í líðunum á Oljufjallinum, omanvert gamla Getsemane urtagarðin, stendur tann prýðiliga, russiska Maria Magdalenu kirkjan við sínum mongu gulltaktu kuplum og spírum og kappast við stóra halgidómin hinumegin.

Einir fýra-fimm arabarar koma rennandi við ymiskum, teir vilja selja fremmandamanninum, sum stígur úr hýruvogninum her ovast á Oljufjallinum. Teir eru fáir í dag, fremmandu ferðamenninir, sum leggja leiðina hendaveg. Ferðaleiðarin var heldur einki fyri at fara higar. Helt, at tað var helst ikki so nógv við at fara á Oljufjallið, tí hetta er jú arabiskt øki.

Men sett var uppá, at Oljufjallið skal vitjast á eini ferð í Jerusalem. Annars er ferðin sum einki at rokna. Og tí boygdi hann seg so fyri.

Arabararnir eru hálvfirtnir soleiðis, tá eingin keypshugur er.

- Tit handla kanska bara við jødarnar? halda teir eitt sindur forhánisliga og leggja dýran við, hvussu stóra familju teir hava gangandi heima, sum skal forsyrgjast. Og av ávum jødanna ganga teir nú arbeiðsleysir, so her er ein møguleiki fyri at gera eina góða gerð.

Hvussu var og ikki endaði øll parlamenteranin við, at ein mynd av staðnum varð keypt, hóast hon myndaði tað sama, sum longu var komið í fototólið frammanundan. Men tað hildu hesir vera í so gírugt av einum vesturlendskum pílagrími. Teir um tað.

Og her liggur so søgan fyri tær. Oman fjallasíðuna tann stóri, jødiski kirkjugarðurin. Getsemane. Kedrondalurin. Og upp hinumegin teir veldugu múrarnir kring Heilaga Staðin við múraða Gylta Liðnum, har Messias »pá tann eina dag« skal koma aftur ígjøgnum.

Men tí hava muslimarnir effektivt syrgt fyri at steðga, halda teir. Teir hava múrað portrið heilt. Og so hava teir lagt ein muslimskan kirkjugarð niður við múrinum beint uttan fyri grindina.

Jødiski Messias, vænta teir, verður helst ein prestur, og ein slíkur kann ikki fara um ein kirkjugarð. Og als ikki ein muslimskan. Tí so gerst hann óreinur.

Men her er hann kortini farin um dalin, lítillátin á ásna ríðandi, á ungum klyvjadjórsfyli.

Tá hevur dalurin ikki sæð út sum í dag, og ivaleyst hevur maðurin hildið aðra leið enn hana, vit í dag ganga beint oman fjallasíðuna.

Hann kom úr Betfage og Betániu, sum liggja eystanvert Oljufjallið, og er tískil uttan iva farin sunnanfyri og síðan niðan móti Dungaportrinum, sum vit tó eisini fara at ganga ígjøgnum, tá vit um eina stund fara inn í býin.

Á ungum ásna kom hann og ikki í prangandi krígsvogni, drignum av fleiri hestum við levint og gangi.

Ella sum vit komu øvugtan veg í dag. Í Mercedes. Nei, var tað í dag, kom hann ivaleyst á eini gamlari, kanska rustaðari súkklu, sum lænt var frá einum og hvørjum arbeiðsleysum araba, sum sat undir veggi og royndi at selja ein og hvønn meira ella minni virðisleysan minnislut til fremmanda mannin, sum her kom ferðandi.

Hann fór um grindina inn í halgidómin, sum stóð stutt haðani. Og tað var ikki við mýkindum, har varð farið fram.

Men tað er ein onnur søga, vit fara at venda aftur til í seinni frásøgn.